# Fyrsti dagur í Nesinum

**Jóannes Eidesgaard er farin undir sjeynda arbeiðsárið í Tinganesi**

LØGMAÐUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Mikumorgunin var fyrsti arbeisdagur hjá Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, í Tinganesi – sum løgmaður.

Jóannes Eidesgaard hevur fyrr sitið í landsstýrinum. Fyrst sum landsstýrismaður í heilsu- og almannamálum frá 1991-94 og seinni sum landsstýrismaður í fíggjarmálum frá 1994-96, so í veruleikanum fer hann undir sjeynda arbeiðsárið í Tinganesi – men fyri fyrstu ferð við borðendan sum Føroya Løgmaður.

Eitt tað fyrsta hjá nýggja løgmanni var at síggja hølini, sum eru nógv broytt, síðani Jóannes Eidesgaard seinanst starvaðist í Tinganesi í 1996. Hann nýtti eisini høvið at heilsa upp á starvsfólkið.



*Skrivarin hjá løgmanni, Ann Hjaltalin og Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri saman við løgmanni fyrsta arbeiðsdagin*







*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, heilsaði mikumorgunin upp á starvsfólkið í Tinganes: Durita Jóannesardóttir lesur á lærda háskúlanumí Århus, men hevur lestrarstarv á Løgmansskrivstovuni. Niels á Velbastað er gamal í garði og hevur arbeitt nógv saman við Jóannes Eidesgaard fyrr. Eyðun Luid, húsavørður, heilsaði eisini upp á nýggja løgmann*

# Kári limur í Norðurlandaráðnum

**Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum fær nógv burtur úr at vera í valbólki við samgonguni. Hann verður limur í Norðurlandaráðnum, hann verður formaður í landsstýrismálanevndini og limur í fíggjarnevndini**

LØGTINGSNEVNDIR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sjálvstýrisflokkurin fær sera góða úrstøku burtur úr at vera í valbólki saman við samgonguni. Av tí at tey 32 løgtingsfólkini skulu manna 45 nevndarsessir, so fær ein flokkur altíð onkran sess. Men var Sjálvstýrisflokkurin einsamallur í valbólki, so fekk hann bara ein sess. Avtalan við samgonguna gevur honum tveir sessir afturat.

– Eg havi sjálvandi góðan hug á einum sessi í fíggjarnevndini, sigur Kári P. Højgaard, sum ikki vil siga nakað um, hvørjar avtalur eru gjørdar millum hann og samgonuna.

Men vit vita, at samgongan saman við Sjálvstýrisflokkinum fær báðar limirnar í Norðurlandaráðnum. Vanligt er at samgonga og andstøða fáa hvør sín sess, men 22 av 32 tingfólkum gevur samgonguvalbólkinum 1. og 2. sessin í øllum nevndum og harvið eisini bæði umboðini í Norðurlandaráðnum.

Tjóðveldisflokkurin hevur ætlað at valt Høgna Hoydal í Norðurlandaráðið. Hann hevur sum landsstýrismaður havt norðurlandamál sum málsøki og var tí eitt upplagt boð upp á lim í Norðurlandaráðnum. Var Sjálvstýrisflokkurin í staðin í valbólki við andstøðuna, so fekk andstøðan annan limin í Norðurlandaráðnum, sum heilt vist hevði verið Høgni Hoydal.

Men soleiðis verður tað ikki.

Kári P. Højgaard sigur, at hann kennir tað sum sína skyldu at fáa so stóra ávirkan, sum til ber. Tí ger hann alt, sum hann kann fyri at fáa sum mest burturúr fyri flokkin.

Kári P. Højgaard harmast sjálvandi um, at flokkurin ikki kom við í samgonguna. Hann sigur, at tá hann fekk at vita, at flokkurin ikki fór at fáa umboð í landsstýrið, so var einki endamál í at vera við í samgonguni.

– Tað hevur alt at siga fyri okkum at fáa fleiri andlit úteftir, og tað høvdu vit fingið, um vit t. d. høvdu ein landsstýrismann, sigur Kári P. Højgaard, sum nú má gera alt arbeiðið einsamallur.

Men hann sigur, at hann verður ein kvalifiseraður mótspælari hjá samgonguni soleiðis at skilja, at hann fer at taka støðu til mál fyri mál, og hann fer at taka undir við tí, sum hann heldur vera vert at taka undir við.

Hann sigur eisini, at tað var eitt greitt signal, tá hann atkvøddi blankt til løgmansvalið. Harvið vísti hann samgonguni, at hann stendur leysur. Restin av andstøðuni atkvøddi ímóti, men tað gjørdi Kári P. Højgaard ikki.

Av tí at Sjálvstýrisflokkurin peikaði á Jóannes Eidesgaard sum samráðingarleiðara, so hevur hann uttan iva eisini fingið ta goodwill, at flokkurin nú sleppur í valbólkin. Samgongan má so víkja í øllum førum ein sess til hansara fyri hesa avtalu.

Hvussu er og ikki, so hevur Kári P. Højgaard megnað at telva minsta flokkin á tingi í eina lutvísa lyklastøðu. Sum formaður í Landsstýrismálanevndini og sum Norðurlandaráðslimur, fara vit tí at hoyra nógv til einsamalla tingmannin hjá Sjálvstýrisflokkinum.



*Tað hevur eydnast einsamalla tingmanninum hjá Sjálvstýrisflokkinum at telva seg í eina lutvísa lyklastøðu. Við at fara í valbólk við samgonguna fær Kári P. Højgaard annan sessin í Norðurlandaráðnum, sum Tjóðveldisflokkurin annars hevði ætlað Høgna Hoydal. Harumframt verður hann formaður í Landsstýrismálanevndini og limur í fíggjarnevndini*



Poul Nyrup Rasmussen:

# Breið samgonga fer at tryggja stabiliet

**Hann var forsætisráðharri i Danmark stóran part av tíðíni meðan fullveldissamgongan sat. Nú Føroyar hava fingið eina breiða samgongu, heldur Poul Nyrup Rasmussen, at tað fer at tryggja meira stabil viðurskifti. Hann ynskir nýggja landsstýrinum við Jóannes Eidesgaard sum løgmanni góðan byr**

NÝTT LANDSSTÝRI
*Jan Muller, Kolding*

– Eg vil fegin ynskja Javnaðarflokkinum og Jóannes Eidesgaard tillukku vid tí góða valinum og eisini við teirri nýggju ábyrgdini, sum Jóannes Eidesgaard hevur fingið sum nýggjur løgmaður, og eg ivist onga løtu i, at hann er maður fyri at kunna umsita hesa stóru uppgávu.



*– Eg síggi ti møguleikan fyri einum góðum samstarvi i framtíðini og eina góða kós fyri Føroyar, sum eg avgjørt kann taka undir við, sigur Poul Nyrup Rasmussen, fyrrverandi forsætisráðharri í Danmark*

Hetta sigur fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen við Sosialin. Hann heldur tað eisini vera sera gott fyri Føroyar, at landið hevur fingið eina breiða stjórn. Tað skapar størri stabilitet og savnar eisini størri part av fólkinum um ta leið, Føroyar vilja ganga.

Poul Nyrup Rasmussen sigur seg eisini vera sera samdan um ta kós, sum nýggja samgongan hevur sett ut í kortidð, at øki verða yvirtikin sohvørt ein heldur ein megnar uppgávuna fíggjarliga og politiskt, og tað eiga danir eisini at kunna innrætta seg eftir.

– Eg síggi tí møguleikan fyri einum góðum samstarvi í framtíðini og eina góða kós fyri Føroyar, sum eg avgjørt kann taka undir við.

*– Tær hevði kanska dámt, at hetta landsstýrið var íkomið nakað fyrr?*

– Tað er so ein onnur søgu. Men soleiðis er tað nú einaferð. Í einum demokratii kanst tú ikki altíð »tima« tingini, sum ein heldur tey skulu vera. Tað avgerandi er, at tit nú fáa ein stabilan politiskan útvikling í Føroyum, sum eg haldi er sera sera gott fyri Føroya fólk og fyri Føroya framtíð, og eg trúgvi fult og heilt uppá, at hetta vil Danmark eisini og sjálvur vil eg eisini personliga gera mítt til at tryggja ein slikan útvikling.

Poul Nyrup Rasmussen luttók mánadagin á eini stórari fjølmiðlaráðstevnu í Kolding, har tey bæði stóru føroysku bløðini vóru umboðað.

# Samgongan fær allar formansessirnar

**Teir tríggir stóru flokkarnir fáa tveir nevndarformenn í part, meðan Sjálvstýrisflokkurin fær formannin í Landsstýrismálanevndini**

LØGTINGSNEVNDIR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag skulu allar løgtingsnevndirnar mannast. Endaliga telvingin var sjálvandi ikki fingin upp á pláss áðrenn blaðið fór til prentingar, men vit hava roynt at fregnast.

Valbólkurin hjá samgonguni og Sjálvstýrisflokkinum fáa allar formanssessirnar í øllum teimum sjey tingnevndunum.

Teir tríggir samgonguflokkarnir býta formanssessirnar millum sínum í teimum seks stóru nevndunum, meðan Sjálvstýrisflokkurin fær formannin í Landsstýrismálanevndini.

Fólkaflokkurin fær formannin í fíggjarnevndini, og verður tað eftir øllum at døma Anfinn Kallsberg.

Fólkaflokkurin fær eisini formannin í Trivnaðarnevndini, og er besta boðið upp á formann har Jørgen Niclasen.

Javnaðarflokkurin fær formannin í Vinnunevndini. Har er upplagda boðið Hendrik Old, sum hevur verið formaður har seinasta valskeiðið. Hesaferð fær Javnaðarflokkurin eisini formannin í Mentanarnevndini, og verður tað Andrias Petersen.

Sambandsflokkurin fær formannin í Uttanlandsnevndini og í Rættarnevndini. Vit gita, at Alfred Olsen verður formaður í Uttanlandsnevndini, meðan Kaj Leo Johannesen verður formaður í Rættarnevndini. Tað kann eisini hugsast, at Kaj Leo hevur tokka til Vinnunevndina, men har eigur Javnaðarflokkurin formannin.

Andstøðan viknaði nakað av, at Kári P. Højgaard valdi at fara saman við samgonguni. Týðuligast merkist tað við, at Tjóðveldisflokkurin ikki fær umboðan í Norðurlandaráðnum. Men væntast kann, at Miðflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fara í valbólk, og so skulu teir eisini býta sessirnar sínamillum. Hesin valbókur fær tveir limir í teimum seks stóru nevndunum og eitt umboð í Landsstýrismálanevndini.

Sum vit skilja, so verða Karsten Hansen og Páll á Reynatúgvu limir í fíggjarnevndini.

Tórbjørn Jacobsen verður limur í Vinnunevndini. Hergeir Nielsen og Jenis av Rana verða limir í Uttanlandsnevndini, og Bill Justinussen verður uttan iva limur í Trivnaðarnevndini.

# Kristian formaður í tingbólkinum

LØGTINGSNEVNDIR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað verður Kristian Magnussen, sum verður nýggjur formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, nú Jóannes Eidesgaard varð valdur til løgmann og harvið ikki longur er partur av tingbólkinu.

Kristian Magnussen, sum var fyrstvaldi tingmaður hjá Javnaðarflokkinum í Havn, hevur sitið á tingi fyri Javnaðarflokkinum síðani 1998. Hann kom fyrstu ferð á ting í 1994 fyri Verkamannafylkingina og sat eisini eitt skifti í landsstýrnum við heilsu- og almannamálum.

Formaðurin í tingbólkinum er hann, ið skipar fyri organisatoriska arbeiðinum hjá tingmonnunum og hann, ið úttalar seg vegna flokkin á tingi.

*Kristian Magnussen verður formaður Javnaðarfloksins á tingi*



## Óvanliga stórur valbólkur

**Av tí at breiða samgongan og Sjálvstýrisflokkurin fara í valbólk, verður samgonguvalbólkurin óvanliga breiður og fær fimm av sjey nevndarlimum í øllum teimum seks stóru nevndunum**

LØGTINGS-NEVNDIR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag skal løgtingið manna tær sjey løgtingsnevndirnar. Tilsamans skulu 45 nevndarsessir mannast.

Talan verður uttan iva um tveir valbólkar. Tey 21 tingfólkini hjá samgonguni fara í valbólk saman við Sjálvstýrisflokkinum og verða sostatt størsti bólkurin við 22 løgtingsumboðum.

Andstøðan fer uttan iva saman í valbólk, tey átta úr Tjóðveldisflokkinum og teir báðir í Miflokkinum verða so hin valbólkurin við 10 løgtingsumboðum aftan fyri seg.

Tað eru sjey løgtingsnevndir. Í seks teirra skulu sjey fólk veljast, meðan einans trý skulu veljast í Landsstýrismálanevndina.

Tær sjey nevndirnar eru:

- Fíggjarnevndin:
- Mentanarnevndin
- Rættarnevndin
- Trivnaðarnevndin
- Uttanlandsnevndin
- Vinnunevndin
- Landsstýrismálanevndin